# Tvey farloyvisstørv sum miðlatøkningur í Kringvarpi Føroya

Kringvarp Føroya søkir eftir tveimum miðlatøkningum í tíðaravmarkaði farloyvisstørv. Størvini skulu setast skjótast til ber og vara til ávikavist 31. mai 2019 og 30. juni 2019.

**Størvini**
Sum miðlatøkningur verður tú partur í einum toymi á deildini Tøkni við fotografum og klipparum, sum m.a. arbeiða við tíðindum, mentan, barna- & ungdómstilfari og ítrótti. Arbeiðsøkið er innan video, redigering og ljóð á pallunum sjónvarp, útvarp og web. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og hoyra til deildina Tøkni.

**Krøv**
Tú skal vera útbúgvin innan fjølmiðlar og hava royndir frá fjølmiðlum, ella hava útbúgving og arbeiðsroyndir, sum kunnu javnmetast. Tú skal hava góðar tøkniligar førleikar og duga grundleggjandi telduforrit. Hevur tú royndir við at framleiða sendingar, er tað ein fyrimunur.

**Vit bjóða**
- Eitt spennandi, avbjóðandi og mennandi starv í einum kreativum umhvørvi.
- Eitt starv, sum tú kanst seta tín dám á.
- Eitt starv, sum gevur tær innlit í føroyska samfelagið.

**Vit ynskja**
- At tú dugur at skipa arbeiðið væl, soleiðis at ásettar tíðarætlanir halda.
- At tú ert kreativ/ur, hevur gott hugflog og kann geva títt íkast á redaksjónunum.
- At tú ert kvik/ur og megnar at arbeiða undir trýsti.
- At tú hevur góð samstarvsevni, ert tolin og kann arbeiða undir skiftandi arbeiðsumstøðum.
- At tú ert eitt jaligt og arbeiðssamt starvsfólk, sum brennur fyri at siga ta góðu søguna.

**Setanarviðurskifti**
Talan er um tvey tíðaravmarkaði farloyvisstørv, sum verða sett eftir sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið. Tann, sum verður settur í starv, má tola broytingar í starvsinnihaldi. Royndartíðin er tríggjar mánaðir.

**Umsóknarfreist**
Umsókn við CV, prógvum, viðmælum og viðkomandi skjølum, skal sendast til umsokn@kvf.fo í seinasta lagi 25. mai 2018 á midnátt. Merk teldupostin “Miðlatøkningur” í evnisrútin. Skrivliga tilfarið skal sendast sum ein samlað PDF fíla.

**Upplýsingar**
Um tú ynskir meira kunning, ert tú vælkomin at venda tær til Hjallgrím Hentze, Tøknileiðara, telefon 296601 ella teldupost hen@kvf.fo.

*Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Kringvarpsstjórin stjórnar stovninum við tilvísing til eitt stýrið við sjey limum. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum, ískoytisveitingum og eydnuspølum. Kringvarp Føroya hevur fýra deildir: Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting.Áleið 80 fólk eru í føstum starvi á stovninum.*